## Elsta sjúkrasystir í Føroyum:

# Ellen Lützen 100 ár

**Ellen Lützen í Havn verður 100 ár komandi mikudag 6. mai. Tað er stuttligt at gerast so gomul, tá ið ein er so væl fyri sum Ellen. Men hon hevur tað ikki frá fremmandum. Olduromman í Øravík gjørdist 104 ára gomul. Mamman og omman blivu yvir 90 ára gamlar**



Ellen dugur framvegis væl at greiða frá

### 100 ár



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Ellen er fødd niðri í Stovu í Sjúrðargarði í Fámjin. Foreldrini vóru Anna og Ellindur Erlingsson. Tey vóru 12 systkin, níggju systrar og tríggir beiggjar. Eftir av systkjunum eru Mia, Herborg og Trond, sum øll búgva í Danmark.

Pápin var upprunaliga fiskimaður, men seinni fekst hann bert við jørð. Her var nógv at gera fyri hvørja hond. Mamman vevaði millum annað til føroysk klæðir. Annars var eisini bæði spunnið og bundið. Men so frægt var tað, at tað bar til at selja ullina.

Ellen hevur sum mong onnur upplivað stórar broytingar í sínun langa lívi. Men umframt alt tað sum er hent hesi 100 árini, hevur tað eisini verið ein stór broyting at koma úr Fámjin til Havnar, sum hon kom fyri einum 80 árum síðani.

Fámjin var jú ein lítil bygd, og hevur kanska eisini verið ein útjaðari við tí sambandi, sum tá var til restina av landinum.

### Til Havnar

Men Fámjin skuldi ikki gerast framtíðin hjá Ellen. Hon fór til Havnar at læra til sjúkrasystir.

Íblásturin var, at ein pápasystir hennara var sjúkrasystir á Tvøroyri í mong ár.

Hetta man hava verið umleið 1930, kanska áðrenn, og kom hon á tað tá rættuliga nýggja Dronning Alexandrines Hospital, sum varð tikið í brúk í 1924. Tað avloysti tað gamla Færø Amts Hospital, sum enn er til.

Tá vóru umstøðurnar so ótrúliga nógv øðrvísi enn í dag. Um tað vóru fimm næmingar, máttu allar búgva á sama kamari, og tær skuldu vera inni klokkan 23. Tað varð arbeitt 12 tímar um samdøgrið, so var skúlagongd umframt.

Summarfrítíðin var 14 dagar, og tá kundi farast heim til Fámjins. Lønin var um 20 krónur um mánaðin fyrstu árini umframt kost, innivist og klæði. Seinni fór lønin upp á 40 krónur.

Fyri at vísa ta stóru broytingina síðan Ellen arbeiddi sum sjúkrasystir skulu nøkur tøl nevnast.

Í 1930 var starvsfólkatalið um 50. Nú man tað liggja um 700. Talið av árligum innleggingum var um 1.000. Nú man tað vera 11-12.000. Miðal innleggingartíð var 45 dagar, nú er hon seks dagar. Men tað vóru tuberklarnir, sum serliga hækkaðu dagatalið tá.

Tá máttu øll á einum sjúkrahúsi gera alt. Tí kom Ellen sovæl at arbeiða á skurðgongini og á TB, sum var tuberkladeildin hjá sjúkrahúsinum.

Ellen gjørdist ikki drúgv sum sjúkrasystir. Hon giftist 20. august 1932, 23 ára gomul, við tí javngamla Mogens Lützen, sum doyði í 2006. Tað kann vera nevnt, at tey náddu at vera gift í ikki færri enn 73 og eitt hálvt ár. Hetta man helst vera met í Føroyum.



*Nýgift í 1932. Tey vóru gift í ikki færri enn 73 ár*

### Komu saman av einum grasstrái

Tað er ein stuttlig søga um, hvussu Ellen og Mogens funnu saman. Hetta var á hospitalinum, táið hon starvaðist har. Mogens hevði verið so óheppin - ella meira at kalla heppin, tá hugsað verður um avleiðingarnar - at seta eitt grasstrá í hálsin, og tað fekst ikki burtur við egnari hjálp. Tískil mátti hann fara á hospitalið at fáa hetta orðnað. Sjúkrasystirin, sum hjálpti læknanum, var Ellen og ferdugt var! Hetta grasstráið kom tískil at gerast hansara og teirra lagna og lukka.

Áðrenn tey giftust fekk Ellen eisini tuberklasmittuna í samband við sítt arbeiði á TB. Hon kom tá heim til verforeldrini at vera og kom fyri seg aftur

Tað var skjótt, at tey bæði fingu børn, og tá í tíðini var tað jú tað mest vanliga hjá konum at vera heima at passa heimið. Hetta gjørdi Ellen eisini.

Men hon man í dag vera elsta sjúkrasystir í Føroyum.

Mogens var sonur Ellen og Valdemar Lützen, sum grundlegði handilsfyritøkuna við sama navni.

Tað gjørdis Mogens, sum kom at dríva fyritøkuna víðari aftaná pápan. Hann fekk útbúgving í Danmark og starvaðist har, inntil hann fyrst í 30-unum varð biðin um at koma heim aftur.

Eitt eyðkenni fyri Valdemar Lützen var, at hetta var ein fyritøka, har arbeiðsfólkið treivst, og tað eru fleiri dømi um fólk, sum arbeiddu har í 50 ár og meira enn tað.

Størsta partin av lívinum hevur Ellen verið ein partur av lívinum hjá Mogens og hansara virksemi. Aftanfyri alt hetta virksemi mátti jú standa ein góð kvinna. Ellen var eisini Mogens ein góð kona, sum hevur stýrt húsinum væl, og eigur hon eisini sín part av avrikinum hjá manninum.

Hetta merkti, at hon umframt at skula vera húsmóður eisini skuldi verða vertinna við nógvum av tí, sum Mogens stóð fyri sum stjóri fyri fyritøkuna og eisini sum enskur og seinni franskur konsul.

Sum enskur konsul kom Mogens eisini at vera í miðdeplinum undir krígnum. Hetta kravdi eisini sín mann.

Eisini vóru nógvar vitjanir av handilsferðandi og manningum frá fronskum skipum, sum komu higar.

Hesar uppgávur kláraði Ellen til fulnar, so løtt í sinninum sum hon framvegis er. Hon hevur tískil verið eitt gott umboð fyri Føroyar.

Ellen hevur eisini verið fitt í hondunum. Hon hevur bundið og broderað nógv, tað hevur altíð verið snøgt og væl úr hondum greitt. Framvegis kann hon binda stiklavond, hóast eyguni eru rættuliga nógv farin.

Menn fyrst og fremst hevur Ellen verið ein góð mamma. Børnini minnast framvegis við gleði á tær útferðir, sum mamman fór við teimum millum annað út í Havnardal.

### Aftur til Fámjin

Fámjin var ein útróðarbygd, har

Sosialurin